# 40 ár eftir bliknar myndin



**Søgufólk halda, at tað vóru tríggjar høvuðsorsøkir til, at Che Guevara fekk ta støðu, sum hann fekk. Fyri tað fyrsta doyði hann ungur. Hann var 39. Í øðrum lagi minti lík hansara ikki sørt um Jesus, og í triðja lagi doyði hann í einari tíð, tá borgararættindastríðið herjaði í USA, og studentarnir í Evropa gingu í gøtunum**

Tað er 9. oktober í 1967. Klokkan er 13.10. Langt inni í boliviska frumskóginum, í fátæku bygdini La Higuera, verður ein skitin maður leiddur út úr tí, sum eina ferð var ein skúli.

**- Skjót hann! Hann er ikki annað enn eitt fólk!**

So hoyrast skotini frá rifluni hjá Mario Teran, kapteyni í boliviska herinum. Tann 39 ára gamli Ernesto "Che" Guevara er deyður í einsemi. Fidel Castro hevur gloymt hann, og boliviski kommunistaflokkurin PCB hevur svikið hann. Sjúkur, særdur og skitin, men við einari turkatrúgv upp á ta marxistisku kollveltingina. Che Guevara var deyður, og ein nýggj ímynd hevði sæð dagsins ljós.



Ernesto Guevara Lynch de la Serna. Føddur 14. juni í 1928 í Rosario í Argentina. Giftur tvær ferðir og átti seks børn. Deyður 9. oktober í 1967 í La Higuera í Bolivia. Í 1997 vórðu leivdirnar av Che fluttar til Santa Clara í Kuba. Útbúgvin lækni. Í 1956 fór Che saman við Fidel Castro og 80 hermonnum við skipinum Gamma úr Meksiko til Kuba. Nýggjársaftan í 1959 flýddi einaræðisharrin Baptista úr Kuba.

## Tann ungi Che

Ernesto Guevara vaks upp í einum argentinskum meðalstættarhúski. Foreldrini styðjaðu vinstravongin.

Tann ungi Ernestu las læknavísindi. Í 1953 fór hann á eina átta mánaðir langa motorsúkluferð kring Latínamerika, og tað skuldi vísa seg, at hendan ferðin fekk stóra ávirkan á hansara politisku sannføring. Á ferðini sá hann, hvussu fátækir bøndur vórðu illa viðfarnir, hvussu arbeiðsmenn vórðu háðaðir, og hann varð stórliga ávirkaður av tí ovurstóra muninum á ríkum og fátækum.

Heimafturkomin til Argentina gjørdi hann seg lidnan við lesnaðin, stakk í sekkin og fór av landinum. Hann kom ongantíð heimaftur. Terningarnir vóru kastaðir, og eitt lív í kollveltingarinnar tænastu var byrjað.

## Kollveltingaraðurin Che

Che fór til Meksiko. Hetta var í 1956, og her hitti hann Fidel Castro, sum hevði sett sær sum mál at fella kubanska einaræðisharran, Fulgencio Baptista, og at skipa Kuba sum eitt demokratiskt samfelag. Nýggjársaftan í 1959 tóku teir høvuðsstaðin Havana, og Che varð tilnevndur tjóðbankastjóri og ídnaðarmálaráðharri í tí nýggja Kuba.

Men sum tann ektaði hugsjónarmaður hann var, veik Che ongantíð frá hugtøkum sum morali og trúgv, og tað vardi heldur ikki leingi, til hann gjørdist ósamdur við Castro, sum var heftur av politiskum og búskaparligum stuðuli frá Sovjetsamveldinum.

Í 1964 gjørdi Che av at fara úr Kuba. Hann skrivaði Castro eitt bræv, og hann duldi ikki fyri, at hann var vónsvikin av tí, sum var komið burtur úr kollveltingini. Samstundis segði hann øll størv og kubanska ríkisborgararættin frá sær. Hann fór fyrst til Kongo í Afrika og haðani til Bolivia. Ørindini vóru tey somu allastaðni, men einki kom burturúr, tí fólk høvdu ikki áhuga í hansara blóðugu kollvelting.

## Ein fjølbroytt mynd

Søgufólk í Latínamerika halda, at nú 40 ár eftir deyða hansara er tíðin komin til at fáa eina neyvari og meiri fjølbroytta mynd av Che. Hann var sannførdur kollveltingarmaður, og í hansara eygum skuldi tann einstaki laga seg eftir kollveltingini. Hann var lækni, men samstundis ein kaldur drápsmaður, sum avrættaði fólk uttan so mikið sum at blunka við øðrum eyganum. Vanliga nýtti hann skammbyrsu, og offrið fekk eina kúlu í høvdið. Fidel Castro, sum helti til ta meiri siðiligu kollveltingina, var ovfarin av, hvussu kaldblóðugur Che var. Tá Castro eina ferð ætlaðii at bjarga einum fyrrverandi njósnara undan avrætting, fekk hann stuut at vita, at njósnarin var longu tikin av døgum.

Argentinski søgumaðurin og rithøvundurin Patrick O'Donnell, sum hevur skrivað eina ævisøgu um Che við heitinum "Che - eitt lív fyri einum betri heimi", ger í bókini nógv burturúr, at Castro gjørdi ikki tað minsta fyri at bjarga fyrrverandi stríðsfelaganum.

- Fidel helt nógv av teimum menniskjaligu eginleikunum hjá Che, men politiskt vóru teir ósamdir. Meðan Castro styðjaði Sovjetsamveldið av fullum huga, helt Che lítið um leiðararnar í Kreml. Che var av teirri uppfatan, at vegurin til sosialismuna gekk ígjøgnum blóðugar kollveltingar jeldur enn friðarliga samveru. Hansara hugsjón medvirkaði til spjaðing í teimum latínamerikonsku

Sosialurin